# Próvtøkur á Vinnuháskúlanum

**Mánadagin 5. mars var próvhandan hjá maskinistum á Vinnuháskúlanum í Havn**

PRÓVTØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað var nakað serstakt við hesi próvhandanini. Her var talan um royndar maskinmenn, sum hava starvast sum maskinmeistarar á skipum okkara í mong ár, men ikki hava havt nakað prógv og tí hava arbeitt við undantaksloyvum, men hetta er nú liðugt. Um stutta tíð verður undantaksloyvið ikki givið.

Landstýrismaðurin hevur skipað so fyri, at hesir menn kunnu fáa eina útbúgving, sum maskinistar eftir ávísum treytum, og hevur hann tí heitt á Vinnuháskúlan, um at skipa fyri hesi útbúgvingini.

Vinnuháskúlin byrjaði seinasta heyst at fyrireika hesa útbúgving og setti tveir lærarar: Poul Kristian Henriksen og Claus Thomsen at skipa fyri undirvísingini.

Meðalaldurin liggur um tey fimmti, og stóðu allir próvtøkuna.

Luttakararnir eru sera fegnir fyri tað serstøku góðu undirvísing, sum lærararnir so meistarliga megnaðu at útinna.

Lærararnir eru eisini sera fegnir fyri hesa avbjóðing, og ikki minst at teir hava fingið nógva vitan frá hesum royndu maskinmonnum.

Hesaferð vóru tað 13 luttakarar sum fingu prógv og um nakrar vikur verða tað væntandi 8 luttakarar afturat sum fáa prógv.

Frá Vinnuháskúlanum verður sagt, at ætlanin er at skipa fyri einum slíkum skeiði afturat, og hetta skeið byrjar eftir summarfrítíðina. Upptøkuroyndin verður 21. mai og undirvísingin byrjar 13. august. Hetta verður so seinasti møguleiki hjá maskinmonnum at fáa maskinistútbúgving av hesum slagi.



*Teir sum fingu maskinistprógv vóru f.v.: Jón Klæmint Jacobsen, Skálavík, Anfinn Magni Mikkelsen, Søldarfjørður, Thorleif Jacobsen, Hósvík, Heri Hansen, Glyvrar, Óli Frederiksberg, Skáli, Alberg Müller, Kvívík, Magni Reinert, Tórshavn, og Magnus Olsen, Hósvík. Teir sum vanta á myndini eru: Jóanis Andreasen, Tórshavn, Ásmundur Lassen, Klaksvík, Jan Matras, Klaksvík, Marni Zachariasen, Klaksvík, og Joen Jacob Jacobsen, Vágur*

*Mynd: Vinnuháskúlin*

---

Rúni Hansen:

# Vann kapping um bókasnið

TÍÐINDASKRIV

Rúni Hansen hevur vunnið eina kapping um bókasnið. Forening for Boghaandværk útskrivaði í heyst saman við forlagnum Lindhardt og Ringhof kapping um nýskapandi bókasnið. Útvald varð ein nýggj bók eftir David Læby. Næmingar á Danmarks Designskole, Designskolen Kolding, Den Grafiske Højskole, Skolen for visuel kommunikation og Kunstakademiets Arkitektskole luttóku.

Rúni vann kappingina framum øll hesi. Til kappingina skuldu luttakararnir gera uppskot til snið til alla bókina – bæði permu og tekstsnið.

Foreningen for Boghaandværk hevur sum endamál at menna dygdina á bókum og bókasniði og skipar árliga fyri slíkari kapping, har tey eggja grafikarum og sniðgevum at hugsa nýtt í mun til bókasnið.

Rúni Hansen hevur arbeitt hjá Sansum í nógv ár men tekur í løtuni útbúgving á Den Grafiske Højskole. Bókin kemur út í vár. Afturat heiðurinum fekk Rúni eina virðisløn á 10.000 kr.



*Rúni Hansen hevur vunnið eina kapping um bókasnið*

Sig tína meining
í Sosialinum

